# SÍ flongdi Fleyr



*Sørvingar vunnu sannførandi móti Fleyr í Gungadalshøllini í Havn*
Savnsmynd

**FLOGBÓLTUR** Fleyr kom ongantíð í gongd, tá SÍ vitjaði Gundadalshøllini, so tí vunnu sørvingar ein sera sannførandi sigur

Hilmar Jan Hansen

Í fjør var Fleyr ført fyri at spæla upp ímóti bæði SÍ og Mjølnir, sum endaðu í FM-finalunum, men sum heild var størsti trupulleikin hjá havnarmonnunum, at teir vóru ov óstøðugir. Ikki er sørt, at tað sama spøkir í vetur.

Leygardagin var í øllum førum eingin ivi um, hvat av liðunum var tað betra, tá Fleyr tók ímóti SÍ, tí sørvingar vóru snøgt sagt omaná í øllum løtum. Og í løtum var talan um eina veruliga flongju.

Tað tók minni enn ein tíma hjá SÍ at vinna dystin, og tað bleiv gjørt við góðum spæli og einum heilhugaðum innsatsi. Men av tí at mótstøðan hinu megin netið var linlig, gjørdist tað næstan ov lætt.

Fleyr, sum nú hevur tapt fýra av sínum seks dystum higartil, tykist eitt sindur leitandi í løtuni, men fyrst og fremst ræður um at finna eitt støðufesti, ið kann geva úrslit. Tað hava teir í SÍ, sum anda fuglfirðingar í nakkan heilt har frammi – tvey stig aftanfyri, men eisini við einum dysti minni.

hilmarjan@sosialurin.fo

**Eik-ligan** *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 6 | 5 | 1 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 | SÍ | 5 | 4 | 1 | 14 | 3 | 11 | 8 |
| 3 | Mjølnir | 5 | 3 | 2 | 9 | 7 | 2 | 6 |
| 4 | Fleyr | 6 | 2 | 4 | 8 | 14 | -6 | 4 |
| 5 | TB | 6 | 0 | 6 | 1 | 18 | -17 | 0 |

**Fleyr - SÍ** 0-3
(21-25, 17-25, 20-25)

**TB - ÍF** 0-3
(18-25, 17-25, 17-25)

# Einfalt hjá ÍF

**FLOGBÓLTUR** Munurin á liðunum var so mikið stórur, at ÍF kundi loyva sær at lata allar sleppa at spæla, uttan at dysturin fór at ridla fyri tað

Hilmar Jan Hansen

Tað var bókstaviliga toppur og botnur, sum hittust í Trongisvági leygardagin, tá TB tók ímóti ÍF. TB, sum spælir sítt fyrsta kappingarár í Eik-liguni, eigur enn fyrsta stigið til góðar, men fekk eitt sett fyri viku síðani ímóti Mjølnir. ÍF er hinvegin oddalið í bestu mansdeildini, so fortreytirnar hjá liðunum vóru ymiskar.

Fyrstu løtuna av fyrsta setti fylgdi TB við, men miðskeiðis í settinum fór ÍF avstað. Fleiri, ið kanska ikki hava spælt so nógv í hinum dystunum hjá ÍF, sluppu at royna seg frá byrjan, og hinvegin var eitt nú Rúni Weihe ikki inni í fyrsta settinum.

Tey bæði seinnu settini broyttist dysturin ikki stórvegis, men heldur gjørdist uppaftur greiðari, at munur altso er á toppi og botni. ÍF stýrdi spælinum frá byrjan til enda og vann, sum væntað, eisini ein greiðan 3-0 sigur.